

www.oljan.fo

**Jan Müller** 16 - 08 - 2013

# Hægsta oljuframleiðsla í Norra í eitt ár

Framleiðslan av olju, gassi og kondensati á norska landgrunninum í juni í ár rakk nærum 2 mill. tunnum um dagin, ein framgongd uppá 15%. Hagtøl frá norska Oljudirektoratinum vísa, at meðalframleiðslan av olju, gassi og kondensati hækkaði úr 1,7 til 1,96 mill. tunnur um dagin frá juni til juli. Framgongdin er uppá 251.000 tunnur um dagin ella umleið 15%. Hetta er hægsta framleiðslan síðani mai 2012. Ein høvuðsorsøk til vøksturin er, at tað gongur væl hjá fleiri keldum at framleiða olju og gass. Høvdu fleiri oljufelt ikki havt tøkniligar trupulleikar, hevði framleiðslan verið uppaftur hægri.